Sosialurin fyri 25 árum síðan:

# Børn skulka fyri at vinna sigarettir

**Forsíðan á Sosialinum 1. februar 1983.**

Í Sosialinum 1. februar 1983 er ein grein um trupulleikarnar, sum onkrir skúlar í Havn hava av at næmingar skulka fyri at fara inn á grillbarrina ZanZibar í Sverrisgøtu at spæla við spæliautomatirnar har.

Skúlanæmingar hava greitt lærarunum frá, at um teir fáa nóg nógv stig, kunnu teir vinna ein pakka av sigarettum. Teir sum ikki roykja, kunnu ístaðin fyri fáa virði av einum sigarettpakka.

Bjørn Klyver, politiassistentur, upplýsir fyri blaðnum, at tað er loyvt at seta upp spæliautomatir, sum ikki geva tí sum spælir pengaligan vinning.

Í blaðnum stendur m.a. at Óli Jacobsen er afturvaldur sum formaður í Føroya Fiskimannafelag við 1336 atkvøðum móti hinum valevninum, Absalon Absalonsen, sum fekk 339 atkvøður. Gunnar Hoydal er afturvaldur sum formaður í Listafólkasambandi Føroya (LISA), og Jan Müller er valdur til formann í Føroya Blaðmannafelag ístaðin fyri Høgna Djurhuus, sum bar seg undan afturvali.


Dagbladið
Sosialurin
56. árg. ★ kr. 4,-
Nr. 13 ★ týsdagur 1. februar 1983

Óli afturvaldur

Børn skulka fyri at spæla við spæliauto matum

*Skúlanæmingar hava greit frá, at tey kunnu vinn sigarettir, um tey fáa nóg nógv stig*

Síða 4

*Fremstu húsini, har sum ZanZibar er, vóru húsini hjá Ernst Joensen (Ernst hjá Ísaki), húsini í miðjuni vóru tey hjá Vilhelm Tórsheim, og húsini í trimum hæddum bygdu brøðurnir Svend og Andor Eirikstoft, har húsini hjá Hans Jacob Egholm (Blokk) stóðu*

*Sverrisgøta í dag. Tógvhandlinum Igloo er har sum ZanZibar var, og Salong Tóta er har sum húsini hjá Vilhelm Tórsheim stóðu*



Tíðargreinin

# … Føroyar og Olympisku Leikirnir 101

Og tað er í hesum ljósinum, at eg haldi, at vit mugu hava alla virðing fyri okkara ítróttafólkum, sum seta alt til síðis – enntá sín tjóðskap – fyri at røkka hægstu ítróttarligu tindum. Tey eru sum listafólk, ið hava fingið serligar gávur, og eitt serligt mát av miðvísni - "singlemindedness" - at gera alt fyri at røkka sínum ítróttarligu málum. Tá hægstu ítróttarligu tindar skulu røkkast, er ein øðilig innara motivatión neyðug – mál verða sett, ætlanir lagdar og venjingin gjørd. Tað er ítróttarliga avrikið – listarverkið – í sjálvum sær, sum motiverar, ikki hvørjum flaggi, tað verður framt undir.

**Mugu verja sjálvræði**

Eiga Føroyar so ikki bara at kasta saman við Donsku Olympisku Nevndini og senda eitt felags "Ríkisfelagsskapslið" til Olympisku Leikirnar? Danska Olympiska Nevndin hevur rætt hendurnar út og boðið Føroyum og Grønlandi at luttaka á danska landsliðinum. Grønland hevur tikið av tilboðnum.

Í seinastuni hevur David Will, ein skotskur løgfrøðingur, ið sat 17 ár sum varaforseti í FIFA, ávarað bretsku londini, Skotland, Wales og Norðurírland, móti at luttaka í einum felags bretskum liði í Olympisku Leikunum í London 2012. Hetta hevur hann gjørt, hóast FIFA-forsetin, Sepp Blatter, ikki metir nakran vanda vera fyri, at londini missa sín sjálvstøðuga limaskap í FIFA og UEFA, um tey luttaka saman í Olympisku Leikunum. Men David Will metir, at hóast Sepp Blatter meinar hvørt orð, so er einki, ið forðar einum limalandi í FIFA at skjóta upp, at Bretland, tá tað hevur luttikið við felags landsliði í fótbólti í OL 2012, eisini kann gera tað í EM og HM kappingum.

Føroyar eiga tí at verja sítt sjálvræði innan ítrótt sum heykar, men hetta setir í løtuni okkara frægastu ítróttafólk í ta tvístøðu, at um tey av sonnum vilja realisera seg sum ítróttafólk, mugu tey gera tað undir frammandum flaggi.

| Ítróttagrein | Altj. sersamband | Limaskapur |
|---|---|---|
| Hondbóltur | IHF | 1974 |
| Borðtennis | ITTF | 1975 |
| Flogbóltur | FIVB | 1978 |
| Svimjing | FINA | 1981 |
| Badminton | IBF | 1982 |
| Judo | IJF | 1983 |
| Fótbóltur | FIFA | 1988 |
| ÍSB | IPC | 1989 |
| Bogaskjóting | FITA | 1997 |

*Altjóða limaskapir hjá Føroyum í olympiskum greinum. Men olympiski limaskapurin kom ongantíð. Hóast søkt varð um limaskap í 1984, varð hann ikki givin.*